

*Reiðari á Normanner var Zacharias Heinesen, keypmaður, føddur í Bø tann 22/5-1874*

Lincoln City varð bumbaður.

Tá sat eg uppi við Sundsvegin við húsini hjá Hanus við Høgadalsá undir einum torvleypi, á einum plássi, har tað vanliga var hvílt. Eg sá eisini trolaran, tá ið hann fór í luftina.

Hetta var 20. februar 1941. Tá var eitt ræ ttuligt álop framt á Havnina móti oljutangunum á Viðanesi. Umframt Lincoln City varð eisini bretska tangaskipið War Pindari álopið á Skálafirði.

Veðrið var gott, eitt lot av landnyrðingi og okkurt vátakavaælið. Fleiri skip lógu á Havnini hendan dagin.

Tað hevði verið friðarligt allan fyrrapartin, og eingin grunaði, at hetta skuldi gerast ein slíkur skaðadagur.

Kl. 15 ýldu ávaringarlúðrarnir, og tvey týsk flogfør komu inn um Nólsoyareiði og inn yvir Havnina. Skotið varð eftir teimum, og flogførini rýmdu í fyrsta umfari.

Lincoln City fór nú at hiva akkerið inn, so trolarin kundi vera betri fyri at verja seg í einum nýggjum álopi. Tá kom annað flogfarið aftur. Tað blakaði eina bumbu eftir Lincoln City. Hon fór niður við borðinum. Men tá brast hon, og trolarin lyftist upp úr sjónum og brotnaði um tvøran. Alt var eitt rok, og tá ið tað var av, var eingin Lincoln City at síggja.

Fyrsti bátur sum kom á staðið var tann hjá Niclas í Kunoy, og hann bjargaði trimum monnum. Hann varð seinni heiðraður av bretum við eini whiskyfløsku!

Tað var próvtøka á sjómansskúlanum, og her lupu allir avstað at bjarga teimum, sum flutu á sjónum. Av teimum 27 monnunum umborð doyðu teir átta.

Tað var skotið dúgliga eftir flogfarinum. Skiparanum á Vestland dámdi eisini væl at skjóta. Hann skjeyt eftir øllum, eisini eftir hesum flogfarinum, sum seinni neyðlendi á Gøtuvík. Hann helt seg hava skotið tað niður, sum hann lá við kolbrúnna hjá Valdemar. Tað vóru nógvir sum skutu, eisini inni á Skálafjørðinum. Tað vóru eisini fleiri, sum hildu seg hava rakt. Týskararnir við flogfarinum sluppu við lívinum. Teir vóru bjargaðir inn til Syðrugøtu og vórðu seinni sendir til Bretlands.

Hugburðurin hjá bretum man hava verið nakað nógv annarleiðis enn hjá føroyingum. Um kvøldið, sum vanlukkan hendi, og teirra skipsfelagar vóru deyðir, fóru teir í dans!

Eg var umborð á Vestland næstan hvønn dag, og eg skuldi eisini við aftur. Hann ætlaði at fara til Íslands í marts.

Men tað endaði kortini við, at eg fór við Normanner.

Tann »røde djævel« helt áfram við at fiska út frá Fleetwood øll krígsárini. Hann fór til Esbjerg aftaná kríggið. Her rann hann seg eisini í trupulleikar. Hann skuldi til fiskarí við einum nýggjum báti. Hann var so í ørviti, at hann endaði á Miðvági, hóast hann skuldi í Norðsjógvin at fiska. Báturin endaði við at verða seldur í Miðvági. Søgan sigur annars, at hann skuldi ikki vísa seg aftur í Danmark. Hvat annað kann sigast um hann má eg siga, at hann var ein fínur sjómaður og afturat tí framúr fiskimaður. Men hann slapp ótrúliga væl burtur úr øllum tí, sum hann vavdi seg uppí.

## Felagið Nabb

Áðrenn komið verður til Normanner skal greiðast eitt sindur frá virkseminum hjá Zacharias Heinesen.

Felagið NABB hevði keypt fiskastykki frá Vilhelm Poulsen ella »Polla Vilhelm« uppi á Hálsi, har ítróttahøllin stendur í dag. Her turkaðu teir fisk til útfluttnings frá skipum teir áttu. Hetta vóru til dømis Thurid og Normanner við ávikavist Tummas í Hanussarstovu í Skálavík og Lassa Johansen á Strondum sum skiparum. Teir løgdu nógvan fisk upp her í Havn.

Heinesen dugdi væl at fara við bæði skiparum og manning og vóru tí skipini altíð vælrøkt og útgjørd og høvdu mest sum altíð somu manning. Nógvir vóru úr Sandoynni og norðan úr Vík.

Skipini fóru tíðliga av stað og komu tíðliga heimaftur av Suðurlandinum. Fiskurin varð koyrdur niðan á Háls at turka soleiðis at teir altíð sluppu tíðliga av við sín góða fisk.

Hetta gav nógv arbeiði til tey sum arbeiddu í fiskinum og til teir, sum vóru við skipunum. Hetta kom eisini væl við hjá handilsfyritøkuni hjá Heinesen í Vágsbotni, sum reiddi skipini út. Tey sum arbeiddu í fiskinum, keyptu alt sum tey skuldu nýta frá handlinum.



*Fiskafólk uppi á NABB, frá vinstru John hjá Tummas Juel, Olivia hjá Toft Óla, Valger hjá Rasmus í Funningstovu, Essa hjá Rubekki, Sanna hjá Íslendinginum, Annelin hjá Kvívíks Tummas, John hjá Poul á Kirkjuveg, Bina hjá Poul Johs., Anna á Hellu og Poul á Kirkjuvegi*





*Tummas Joensen í Hanusarstovu í Skálavík var skipari hjá Johan við Thurid og Rasmus Johansen, nevndur Lassi, á Strondum hevði verið skipari á Normamanner, men var bestimaður, tá ið Johan var við*

Tá borgarakríggið í Spaniu tók seg upp seinast í 30 unum og seinni heimsbardagi tók seg upp í 1939/40 minkaði eftirspurningurin av klippfiski burtur í onki. Tískil var felagið Nabb avtikið, og skipini Turid og Normanner vóru seld til Íslands. Normanner sigldi fyri íslendingar, har hon sigldi fyri ta mesta við farmi, til hon fyrst í februar mánaða 1952 sigldi á land og sakk við Orknoyar.

## Eg fari við Normanner

Meðan eg bíði eftir Vestland hitti eg ein dagin Zacharias Heinesen. Hann rópar meg og spyr, um eg havi hug at fara ein túr við Normanner. Eg líka sum stúrsaði við. Normanner hevði júst gjørt ein so veldigan túr, har teir høvdu selt fyri 10.000 pund. Hetta var ein rimmar túrur, eisini fyri manningina, sum fekk heilt nógv burtur úr.

Teir høvdu selt hana til Íslands til ein mann sum kallaðist Magnus Andreassen í Reykjavík. Teir høvdu strámann í Føroyum, so munurin gjørdist ikki so stórur.

Eg hugsaði um hetta og var sjálvsagt freistaður av hesum túrinum. Eg segði so við Heinesen, at eg skuldi koma við. Eg hevði jú verið við Turid frammanundan, so vit kendust eisini. Tað var ikki hvør maður, sum fekk bjóðað ein slíkan kjans. Tað var gravgangur eftir at sleppa til skips. Skipini vóru eisini nógv minni mannaði nú, tá tey ikki fiskaðu men sigldu við fiski, sum tey keyptu. Hetta merkti arbeiðsloysi millum fiskimenn.

Eg fór so umborð til Reyða og segði, at eg kom ikki við. Hetta var alt í lagi.

Eg skuldi fara beinanvegin við Normanner, gjørdi meg kláran og fór umborð. Tað vísti seg, at Hans Hansen, Hassin, úr Miðvági, skuldi føra Normanner. Lassen á Strondum, sum hevði ført hann frammanundan til fiskarí, skuldi vera bestimaður. Thorvald Andreassen, seinni kendur skipari av Norðskála, og Petur Hovgaard úr Vági skuldu vera maskinmenn. Við vóru eisini Kristian á Neystabø úr Vík og ein søldfirðingur, sum kallaðist Alfred.

Áðrenn vit fara avstað siga teir, at eg skal vera kokkur. Eg segði kortanei. Skuldi eg vera kokkur, fór eg slett ikki við. Vit tríggir dekkararnir samdust so um, at Kristian skuldi vera kokkur til Íslands, so skuldi glyvramaðurin vera kokkur úr Íslandi til Onglands, síðan skuldi eg vera kokkur aftur til Føroyar.

## Máttu ganga pumpuvakt

Normanner var eitt stórt skip. Hon var ein fransaskonnart og hevði deksmotor til seglini.

Vit tóku fisk á Hafnarfjørðinum og har á leiðini. Normanner lak so illa, at lensipumpan ikki kláraði at halda tørn, so vit máttu ganga pumpivakt fyri at halda lens.

Tá ið fiskurin varð tikin arbeiddu vit saman við manning av landi. Vit skuldu eisini ansa eftir vektini og tílíkum.

Vit fóru so niður til Aberdeen og fingu sjaskveður. Vit máttu alla tíðina hjálpa til at pumpa við dekspumpuni. Tá ið vit komu niður til Scrabster, var ódnarveður. Loðsur kom umborð og segði, hvussu vit skuldu sigla, og so sigldu vit mótu Pentland Firth. Sjálvt í betri líkindum var Pentland Firth ikki bara bara. Tá var veðrið so ringt, at tað vóru stórsjógvar. Tá lak hon so illa, at eingin kundi vera í lugarinum fyri sjógv. Har sigldi alt, so allir búðu har afturi.

**Næstu ferð**

Í komandi parti greiðir Johan frá, tá teir máttu pumpa úr lugarinum. Hann upplivir framvegis nógv undir krígnum. Hetta er ikki minni spennandi enn við reyða djevlinum